## Straw svarar atfinningum

Bretski løgmálaráðharrin, Jack Straw, vísir aftur skuldsetingum um, at avgerðin hjá myndugleikunum at lata libyska yvirgangsmannin Abdelbaset Ali Mohmed al Megrahi leysan hevði samband við ein oljusáttmála millum Bretland og Libya. Sambært Straw er púrt einki hald í skuldsetingini, og hann leggur afturat, at bretska stjórnin kundi ikki funnið uppá at tengt Lockerbie-bumbumannin at einum møguligum oljusáttmála við Libya. Blaðið Sunday Times heldur hinvegis uppá, at stjórnin metti tað vera ein fyrimun fyri handilssamstarvið við Libya, um al Megrashi bleiv latin leysur.



## Olmert ákærdur

Ísraelska ákæruvaldið kunngjørdi í gjár, at Ehud Olmert er ákærdur fyri trý ymisk lógarbrot. Ákæruritið, sum er 61 síður, varð lagt fyri ein dómstól í Jerusalem í gjár. Olmert er ákærdur fyri fíggjarligt svik, skjalafalsan og fyri at hava dult ólógligar inntøkur. Tann 63 ára gamli Olmert hevur alla tíðina hildið uppá, at hann er ósekur, og tað endurtók talsmaður hansara í gjár. Ehud Olmert, sum tók við eftir Ariel Sharon fyrst í 2006, legði frá sær sum forsætisráðharri í september í fjør.

# Nýggj Dan Brown bók í metstórum upplagi

**Bókavinnan hevur brynjað seg óvanliga væl til nýggjastu bókina frá Dan Brown, sum kemur út í metstórum upplagi í komandi viku**

NÝGGJ BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Meðan kreppan andar partar av bókavinnuni í nakkan, kemur ein bók nú út í óvanliga stórum upplagi. Rithøvundurin er heldur ikki hvør sum helst tá tað ræður um metseljarar. Tað er nevniliga Dan Brown, ið tók allan heimin á bóli við The Da Vinci Code, sum nú gevur út bókini The Lost Symbol.

Bókin kemur út í Amerika 15. september, og tástani kunnu týðarar kring heimin sleppa til arbeiðis. Men longu nú er greitt, at bara fyrsta upplagið av donska týðingini verður 110.000 eintøk. Váðin hjá forlagnum er tó neyvan so stórur, tí seinasta bókin hjá Dan Brown "Da Vinci Mysteriet" varð seld í 600.000 eintøkum bara í Danmark.

Eftir ætlan kemur danska týðingin út 16. november, men kappingin er hørð. Í Svøríki eru heili seks týðarar settir á uppgávuna.

Í alt eru bøkurnar hjá Dan Brown seldar í meir enn einari millión eintøkum í Danmark.




*Fyrsta upplagið á donskum av nýggju bókini hjá Dan Brown verður heili 110.000 eintøk.*




*Hvat er at gera, tá man vil verða poppstjørna, men ongan gittara eigur?, spyr Rósa í nýggju bókini "Túsund míl frá tær"*

# Rósa vil verða popp-stjørna

**Ein gamal gittari hjá pápa nyttar lítið, tá tú vilt verða poppstjørna, sum í nýggju bókini um Rósu**

BARNABÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nú er onnur bókin um Lívið sum Rósa, sum nógv børn uttan iva kenna, er komin út á føroyskum. Í bókini Túsund míl frá tær hevur Rósa brúk fyri einum nýggjum gittara. Tann gamli hjá pápanum, sum hon fann á ovasta lofti, nyttar onki. Í hvussu er ikki, um hon ætlar at verða poppstjørna.

Men Rósa hevur ikki ráð at keypa ein gittara sjálv, og tað eru hundrað ár, til hon hevur føðingardag.

Men so gera Rósa okkurt ordiliga býtt. Og so verður hon eisini forelskað í Diego, sum er ein rættilig stjørna. Og Villi verður illur, og so kemur Foppa, og alt verður ein ruðuleiki.

Tað eru Måns Gahrton og Johan Unenge, sum skriva bøkurnar um Rósu - teir somu, sum hava skrivað teknirøðina Ádam og Eva, ið allir Strok lesarar kenna. Bøkurnar um lívið hjá Rósu eru eisini gjørdar til sjónvarpsrøð, og skjótt verður ein spælifilmur eisini gjørdur um hana.

Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út bøkurnar um Rósu

# Eyga fyri eyga í ung-dómskrimi

**Hatur móti samkyndum og hevndarhugur eru evni í ungdómskrimi, sum júst er komin út á føroyskum**

BØKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í vikuni kom seinasta bókin í krimirøðini fyri ung hjá svenska høvundanum Mats Wahl út á føroyskum. Bókin hevur heitið Fortíðar syndir, og eisini hesuferð eru tað børn og ung, ið bæði eru brotsmenn og offur, og kunnu tey vera eins hatursfull og hevndarhugað, sum tey vaksnu.

### Rættvíst hatur?

Fyri trettan árum síðani bleiv ungi maðurin Hilmar sparkaður til deyðis av sera høgravenda tannáringinum Anneli. Nú Anneli er sloppin út aftur úr fongslinum, stillar hon upp fyri ein sera víðgongdan politiskan flokk, sum heldur, at samkynd og innflytarar ikki hoyra heima í svenska samfelagnum.

Dóttir Hilmar, Tove, sum nú er 14 ár, hatar kvinnuna, sum drap pápan, av øllum sínum hjarta. Og nú, hon heldur seg kenna Anneli aftur, dylur hon ikki yvir, at hon hevur sett sær fyri at drepa hana.

Stutt eftir verður Anneli funnin illa viðfarin í heimi sínum. Ikki óvæntað halda mong at 14 ára gamla Tove er brotskvinnan, og brádliga er hennara lív eisini í vanda. Men hóast Tove hevur allar orsøkir at hevna seg inn á Anneli, hevur hon rætt til at verða vard, og hesa uppgávuna átekur politisturin Harald Fors sær.

Um somu tíð er grikkin Seferis fyri einum rasistiskum álopi. Møguliga var álopið bara dreingjalótir, men meðan Harald Fors kannar málið, avgerð familjan hjá Seferis at gera sítt egna kanningararbeiði og seta sína egnu dómsnevnd.

Fortíðar syndir er ein óhugnalig søga um hatur, hevnd og rættvísi. Hóast høvundurin setur einfaldar spurningar, er heimurin í bókunum ongantíð svartur og hvítur og ongi einføld svar finnast.

Í bókunum hjá Wahl eru børn og ung sjáldan so ósek, sum vit fegin vilja halda. Heldur eru tey børn av síni samtíð, bæði so og so, og bøkurnar eggja lesaranum til at síggja seg sjálvan og onnur sum lið í tí veruleika, vit øll eru partur av

Tað er Bókadeild Føroya Lærarafelags, sum gevur krimirøðina fyri ung hjá Mats Wahl út á føroyskum.




*Hatursgerðir frá fortíðini spøkja í svensku krimisøguni fyri ung, sum júst er komin út á føroyskum*